**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 0804**
**Tíðarskeið 3/3-7/3-2008**

---

**Fólk frá FRS.:** Mourits M. Joensen og Regin Kristiansen.

**Ábyrgd:** Bogi Hansen

**Endamál:** Endamálið við túrinum var at fylgja við broytingum í havinum kring Føroyar. Túrurin var ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir teimum fýra standardskurðunum.

**Reiðskapur:** Seabird-CTD við rosettu, WP2 glúpur og útgerð at taka fortoyingar upp við.

**Um túrin:** Vit fóru út mánadagin 3/3 kl.0900. Siglt varð vestur á støð V1, har vit byrjaðu skurðin og tóku støðirnar vestur á Føroyabanka.
Tá liðugt var at taka støðir á skurði V, sigldu vit út í Bankarennuna, har vit tóku eina fortoying upp, eina termistor ketu. Ein partur av fortoyingini var slitnað burtur úr, so vit fingu bert niðasta part aftur.
Haðani varð farið á skurð S og tóku vit hendan skurðin av Munkagrunninum og móti Hetlandi. Á sjey teimum seinastu støðunum tóku vit ikki glúp vegna veður.
Siglt varð so norður á støð E8 og tóku vit hendan skurðin frá markinum og inn ímóti Nólsoynni.
Haðani varð so farið at taka skurð N, hann varð tikin norðureftir, norð á 64°N. Á trimum teimum norðastu støðunum tóku vit ikki glúp vegna veður.
Alt riggaði, sum tað skuldi, og alt gekk væl, hóast veðrið var stak vánaligt onkran dag á túrinum.
Vit vóru aftur á Havnini fríggjakvøldið 7/3 kl. 1800.

**Prøvataking:** Við Seabird CTD-ini tóku vit 48 støðir og saltprøvar á øllum. Við glúpinum tóku vit 38 støðir.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Saltprøvarnir verða analyseraðir í vár.

**Viðmerkingar:** Smávegis trupulleikar vóru við ctd-ini, programmið fann ikki rosettuna, tá skiftast skuldi frá D til U profil.

15-04-2008 ________________________
Regin Kristiansen